# NIR Á VALINUM

## HAMFERÐ

Bólkurin varð stovnaður í 2008 og vann Sementkappingina fyrr í ár. Teir eru ungir havnardreingir, sum spæla tungan og harðan doom metal tónleik á høgum støði.



## KIM HANSEN

Maðurin við stóru røddini og klaverinum, sum bara einaferð hevur givið eina solofløgu út. Hann er við á ótalligum útgávum og spælir við hjá nógvum øðrum tónleikarum, men nú verður endiliga høvi at hoyra Kim Hansen einsamallan.

## ONIONTREE

Enn ein frálíkur nýggjur bólkur við ungum monnum. Tónleikastílurin er punk, og umframt konsertir í Føroyum hava teir onkuntíð spælt uttanlands, har teir millum annað hava hitað upp fyri the Dreams.



## TOS

Navnið er ein stytting av Tollarar og Syndarar. Bárður á Lakjuni, sum er kendur úr bólkinum Salt, er høvuðsmaður í TOS, og vøkru sangirnir snúgva seg um tað andaliga lívið.

## HANS HJALTI SKAALE

Vísusangarin, sum yrkir um føroyska samfelagið við einum skeivum vinkli. Smílini og góða lagið eru tryggjað, tá hann fer á pall.



## PÆTUR VIÐ KELDU

Klaksvíksjingurin, sum kemur úr tiltiknu sangfamiljuni við Keldu, kann við síni vøkru og róligu rødd rúnarbinda áhoyrarar í øllum aldri. Spælir ikki ofta til konsertir, men nú býðst høvi at hoyra hann.



## JENS ELI ELLEFSEN

Gjørdist vælumtóktur, tá hann gav sína fyrstu fløgu, kallað "Gomul Minnir", út. Tónleikurin vendir sær kanska meiri til eldru áhoyrararnar, og harmonikan skal nokk fáa stemningin í topp.



## GUÐRIÐ HANSDÓTTIR

Hevur verið virkin í nógv ár, men sló veruliga sítt navn fast við fløguni "The sky is opening", sum kom út í fjør. Melidiøsi og vælsvingandi fólkapoppurin hevur verið nógv spældur, og fer uttan iva at ljóða væl á stóra pallinum.

## HEINI LÜTZEN

Heini hevur í mong ár verið ein av ídnastu gospeltónleikarunum í landinum, og hann hevur latið eina rúgvu av sangum úr hondum, eins og hann eigur fleiri nýinnspælingar av gomlum andaligum sangum og sálmum.



## ROBERT MCBIRNIE

Forsangarin í FaroeBoys, sum alt lívið hevur verið virkin í tónleikinum. Hann er kendur bæði sum sangari í orkestrið, sum vísusangari og sum undirhaldari á barrum og pubbum.

## CARLSEN

Tær tríggjar Carlsensystrarnar hava sungið, síðani tær vóru føddar. Tær hava verið í USA og roynt seg sum gospelsangarar, og hava nú Noah Chaparro, sum er giftur Barbaru, við sær á pall í klaksvík.



## RÓGVI JAKOBSEN

Ungur guitarspælandi klaksvíkingur, sum hevur æruna av at byrja festivalin 2010. Hann er, hóast sín unga aldur, vanur at framføra bæði í bólki og sum einstaklingur. Umframt at vera tónleikari og sangari, so er hann eisini sangskrivari.

## MARIUS

EP-aktuelli Marius, sum í fjør hevði eina sera góða framførslu, fer í ár at framføra á samanhald-pallinum . Rokkurin er skiftur út við meiri fólksligar singer/songwriter tónar, men eyðkenda røddin er enn hin sama.



## SYNARCHY

Bólkurin er tvey ára gamal og er ein av teimum hørðu og garrvillu bólkunum. Hetta er ein bólkur, sum spælir tungan málmtónleik. Hóast hann bert hevur tvey ár á baki, so er navnið longu boygt í metalli.

## TRÓNDUR ENNI

Ein av okkara bestu singer/songwritarum. Hansara framførslur borga altíð fyri góðum, fólksligum tónleiki, og løgini eru fangandi.





## EYÐUN OG TERJI

Hava heldur ikki tørv á nakrari lýsing. Gera fangandi tónleik, sum fólkinum dámar, og tað kann ikki blíva annað enn ein góð konsert.

## INGUNN OG HERBORG

Ein nýggj og spennandi íslendsk/føroysk duo við føroysku Herborg og íslendsku Ingunn. Tær báðar 20 ára gomlu kvinnurnar fara at framføra sjálvskrivaðar sangir, umframt fleiri kendar føroyskar og íslendskar sangir.



## UNI ARGE

Fótbóltslandsliðsleikarin, sum gjørdist tónleikari, og sum við sínum tveimum útgávum hevur havt fleiri løg, sum eru tráðspæld í útvarpinum.



## TRØLLA PÆTUR

Blíða trøllið, sum elskar børn. Og børnini elska so sanniliga eisini trøllafamiljuna. Fyri børn og barnsligar sálir á stóra pallinum leygardagin kl 15.